# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Rætting

Í grein í "Nøvn í vikuni" leygardagin 1. mai, um listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík, stóð at lesa, at Wilhelm Andreasen var ein av næmingunum á Hoyvíkar Listaskúla, tað var sjálvandi ikki rætt. Wilhelm Andreasen, ið sjálvur er listamaður, varð boðin við sum gestur at sýna fram sínar akvarellir. Hann hevur javnan listaframsýningar, og prýðir hann t.d. permuna á Vágakalendaranum, teknar til søgubókina Skýmingarløtuna og hevur útgivið fleiri postkort við egnum tekningum.

## Dagurin

**5. mai. Gotthard**, deyður í 1038. Abbati og biskupur í Hildesheim. Týskt navn, samansett av orðunum fyri Guð og harður.




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin


## Jógvan Joensen í Svínoy 80 ár

Á Krossmessu, mánadagin 3. mai, fylti Jógvan Joensen í Svínoy 80 ár. Tey, sum frá 60 unum og til fyrst í níti árunum komu til Svínoyar munnu komast við mannin, sum var á støð og tók ímóti postbátinum, um tað so var á Eiðinum ella í Víkini og í logn, ella tá ið náttúran vísti seg frá einari heilt aðrari síðu.

Jógvan er svínoyingur, og hann hevur alla sína tíð búð í Svínoy. Foreldrini vóru bæði úr Svínoy - Anna og Jóannes, sum var bóndi í Heimistovu. Tey fingu sjey børn. Jógvan var elstur og góðar fýra mánaðir yvir níggju ár, tá ið yngsta systurin varð fødd. Anna doyði longu 23. oktober í 1944. Fyri Jóannes og børnini kom tað væl við, at systir hansara Jóhanna og systkinabarn hansara Frida - tær vóru báðar ógiftar - vóru í Heimistovu og tóku sær av bóndahúsinum og hjálptu honum við børnunum. Jóannes doyði 2. páskakvøld í 1960, sum var 18. apríl.

Jógvan kom til mans undir krígnum. Tá var nógvur útróður í Svínoy, og Jógvan var eisini nakrar túrar við trolara seinnu krígsárini. Tað var við Skálabergi, sum Mortan í Hvannasundi førdi. Nógvu tey fyrstu árini eftir kríggið var hann skipsmaður. Hann var við Streymoynni, sum Líggjas hjá Sørini førdi, við Barmi, sum Palli Bjartalíð førdi, Dragabergi, sum Jóannes hjá Dáva førdi og seinni eitt skifti við Sjúrðarbergi, sum Martin í Sundi førdi. Miðskeiðis í fimti árunum róði hann út í Klaksvík við Glottanum hjá Josiasi Matras.

Jógvan giftist 18. september í 1955 við Irenu. Hon var ættað av Kirkju - dóttur Sunnuvu og Zakarias á Deild og hevði lært til sjúkrasystir í Klaksvík. Tey bæði búsettust í Svínoy, og har vóru tey við til at mynda bygdina og bygdarlívið í eitt langt tíðarskeið. Jógvan var bóndi í Heimistovu og hevði ábyrgdina av Strandferðsluni, og Irena var sjúkrasystur. Hon var bygdarráðsformaður eitt skifti, og tá ið tað kom har til, at allir hinir handlarnir, sum høvdu verið í bygdini, høvdu latið aftur, fór hon at handla. Tá ið ein bygd er komin har til, at eingin skúli og eingin handil eru, er bygdin illa fyri, plagdi hon at taka til.

Irena og Jógvan eiga fýra børn. Jóannes býr í Norðdepli, Símun Gutti býr í Svínoy, Jóhanna býr í Hoyvík, og Súsanna býr í Jyllandi. Barnabørnini eru ellivu. Tað var ein stórur smeitur hjá Jógvani og familjuni, tá ið Irena gjørdist sjúk og andaðist 30. desember í 1992.

Føðingardagin helt Jógvan í Svínoy, har familjan var saman við honum. Nú kempu aldurin er náddur, er arbeiðsdagurin ikki so langur, sum hann plagdi at vera, tá ið fjós og postur og bøur og hagi og aftur fjós skuldu passast hvønn einasta dag, og tað var neyðugt at fara yvir um Fjøll og niðan í Grønuna.

Tá ið Jógvan var barn, og Hjalmar Hátún var lærari í Svínoy, vóru fleiri enn fjøruti skúlabørn, og tað var nógv fólk í hvørjum húsi. Nú er tað soleiðis, at tað um vetrarnar og úr gomlu Heimistovuhúsunum ikki sæst á nakað hús, sum tað er ljós í, og í skúlanum er myrkt.

Jógvani dámar kortini best at vera í Svínoy. Hann fylgir við í samfelagsviðurskiftum og eygleiðir náttúruna soleiðis, sum hann altíð hevur gjørt. Nú fer tjaldrið at hava fult reiður, og tað verður ikki so leingi, inntil tað enn eina ferð fer at bera til at telja æðuungarnar, sum flóta niður fyri lendingini saman við stoltu mammuni, ið roynir at verja síni. Og tá ið tann tíðin er farin, verður tað aftur heyst og vetur, og tá verður úr stovuvindeyganum illveðursdagar hugt eftir, hvussu langt niðan øgiligu óløgini skola, tá ið lágættaródnarveðrið stendur inn í Víkina.

Árið og skiftingarnar millum ljós og myrkur, stilli og lýkku og ódn og kulda eru sum lívið og lívsumstøðurnar. Jógvan veit um tað alt at siga. Nú gleðist hann um børn og svigerbørn og barnabørn, og vit ynskja honum hjartaliga tillukku og Harrans signing og nærveru, nú sólin er komin langt vestur á luftina.

JH



✝

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi

**Niclas Petur D. Niclassen**

ættaður av Velbastað, búsitandi í Havn

andaðist á Landssjúkrahúsinum 2. mai, 73 ára gamal.
Bønarhald verður á Landssjúkrahúskapellinum mikukvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður hósdagin 6. mai úr Vesturkirkjuni kl. 13.00.

**Kona, synir og svigardøtur,**
**Tina, Ann-Bjørg, Niclas Petur, Jóhanna og Svend**

## Fríðálvur Bjarkhamar 60 ár



Í dag fyllir Fríðálvur Bjarkhamar, sum er ættaður úr Vági og búsitandi í Keypmannahavn, 60 ár.

Fríðálvur fór til skips. Tað var vegurin hjá honum sum hjá so mongum. Men hann ætlaði annað enn bara at vera fiskimaður. Vildi sleppa víðari út í heim, og fór tí á navigatiónsskúla.

Í 1965 tók hann stýrimansprógv og fór at sigla hjá Mærsk. Har helst hann fram eisini eftir, at hann seinni tók skipsførara-prógv. Í 1971 skifti hann reiðarí og fór í Grønlandssigling.

Í 1979 skifti Fríðálvur hýru og fór at loðsa fyrrverandi starvsfelagarnar í donskum farvatni. Hann byrjaði sum loðsur uttan fyri Ålborg og fór seinni til Keypmannahavnar at verða loðsur.

Nú hann fyllir 60 ár, hevur hann samstundis eisini verið loðsur í 25 ár. Og av hesi fjórðingsøldini hevur hann verið loðsformaður í tey 12 árini. Fríðálvur er í dag í starvi hjá Sundet Lodseri í Keypmannahavn.

Fríðálvur er giftur við Tove, sum er donsk. Tey fingu tvey børn, son og dóttir. Sonurin doyði í 1988 18 ára gamal av ferðsluvanlukku.




# Nýggj klaksvíkarleið er byrjað

**Koyrt verður úr Havnini**
**mánadag, mikudag og fríggjadag**

**Vøra verður heintað til kl. 11.00 í Havnini.**

**vørur kunnu eisini takast við á vegnum norður**

**Koyrt verður hurð til hurð**

**Klaksvíkarleiðin**
Lágarvegur 22
100 Tórshavn
Tel. 505191





# Móttøka

6. mai í ár eru 20 ár liðin síðan viðgerðarstovnurin, Blákrossheimið, sum tann fyrsti av sínum slag her á landi, alment varð tikin í nýtslu. Í tí sambandi verður skipað fyri almennari móttøku á Blákrossheiminum, Lynggøta 12, Tórshavn:

**Hósdagin 6. mai kl. 14.00 - 17.00**

Øll eru í hesum sambandi hjartaliga vælkomin at støkka inn á gólvið

Blái Krossur Føroya
Kristiligur fráhalds- og hjálparfelagsskapur

www.blakross.fo

Sosialurin





KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag


Vika 19, 2004
www.kaupthing.fo

Av misgávum var skeiva talvan og frágreiðingin frá Kaupthing komin í blaðið í gjár.

Vit biða lesaran halda okkum til góðar.

# Týdningarmikil vika fyri framman

Millum høvuðshendingarnar í farnu viku, var kunngerðin av amerikanska búskaparvøkstrinum í 1. ársfjórðing. Væntað var, at árligi vøksturin í ársfjórðinginum fór at verða 5,0% men hesin gjørdist einans 4,2%; tó 0,1% meira enn í 4. ársfjórðingi í fjør. Hóast talið gjørdist lægri enn væntað, er kortini eingin ivi um, at búskapurin í USA nú veruliga hevur funnið stevið aftur. Kunngjørt varð samstundis, at prísvøksturin er hækkandi í USA.

Bjartskygnið í USA er eisini hækkað farnu vikuna. Slíkar bjartar kunngerðir umframt ábendingar um at prísvøksturin er hækkandi, eru høvuðsorsøkirnar til, at rentur í seinastuni eru hækkaðar; seinasta mánaðin er eitt nú rentan á 10-ára danska statslánsbrævinum hækkað úr 4,00% í 4,36%.

Sum heild hava búskaparligu uppgerðirnar verið positivar seinasta mánaðin, hóast útlitini fyri bert einum mánaða síðani vóru, at næsta rentuhækkingin í USA ikki skuldi væntast fyrr enn í heyst ella vetur, hevur gongdin í búskaparligu uppgerðunum broytt hesa mynd. Sannlíkt er nú, at rentuhækkingin verður framd í summar.

Av júst hesi orsøk verður høvuðshendingin hesa vikuna í dag týsdagin, tá tjóðbankin í USA hevur rentufund. Teir fara ikki at hækka rentuna, men heimsins fíggjarmarknaðir fara neyvt at halda eyguni eftir hvat formaðurin Alan Greenspan fer at siga í samband við fundin. Eisini stóra mánaðarliga arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin, ið verður kunngjørd Dýrabiðidag, verður sera áhugaverd. Um fleiri enn 160.000 arbeiðspláss vóru sett á stovn í apríl, fara lánsbrævarenturnar at hækka; annars kunnu hesar rentur sannlíkt lækka.

Hesar stórhendingar, ið nevndar eru, fara at fáa størri týdning fyri partabrævamarknaðirnar enn roknskaparkunngerðirnar í næstu viku. Um renturnar hækka, kunnu partabrøv lækka, tí hækkandi rentur tálma í løtuni kursgongdina hjá partabrøvunum.

Í farnu viku kunngjørdi Novo Nordisk ein góðan roknskap, og hesa vikuna kunngerða m.a. TDC, Danske Bank, Securitas, S:E:B og Carlsberg.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,61% | 0,00% |
| 5 ára lánsbræv | 3,70% | 0,00% |
| 10 ára lánsbrÊv | 4,36% | 0,00% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 250,9 | -4,5% |
| OMX, Svøríki | 682,9 | -4,6% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.702,4 | -3,2% |
| S&P 500, USA | 1.107,3 | -2,5% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,70 | 0,2% |
| Evru Lánsbrøv | 165,40 | -0,2% |
| Norrøn Partabrøv | 77,51 | -3,4% |
| Altjóða Vøkstur | 64,30 | -5,0% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 622,07 | -0,8% |
| EUR | 744,11 | 0,0% |
| GBP | 1.103,45 | -1,5% |
| NOK | 90,60 | 0,4% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*